Heysttingið hjá Oljutinginum:

# Framtíðar Føroyar fleirfalt so stórar



*Vísindaliga manningin á Jarðfrøðissavninum, ið er knýtt at Landgrunsverkætlanini.*

*Mynd: Jarðfrøðissavnið, Ársfrágreiðing*

## Lama Sea og onkikanndiskuterast.altkann.

KONSERT
*tíðindaskriv*

Fyri aðru ferð í heyst skipar Art fyri konsert í hølunum hjá Margarinfabrikkini.

Bólkarnir ið spæla eru Lama Sea og onkikanndiskuterast.altkann.Og teir lova at rokka húsið so tað stendur eftir.

Báðir bólkarnir eru kendir fyri teirra heilt egna stíl sum stevnir beint inn í frammtíðina.

Lam Sea við einum funkrokkutum stíli sum er sín heilt egin,blandaður við balladukendum tónum og onkikanndisktærast.altkann,við sínum pumpandi rokki sum dregur Jimi Hendrix saman við eitt sindur vinarligari jazz og reggea.

Báðir bólkarnir arbeiða við sínum egna originala tilfari,sum vil eitt sindur meira enn at undirhalda.

Teir vilja flyta okkurt, m.a. lurtarana ætlanir um hvat teir spæla.Teir gera sum regul ikki akkurát tað ein væntar.

Men teir rokka allíkavæl.

So verið við til at stuðla tann kanska einasta alternativa rokkpallin í Havn fríggjkvøldið kl 22,tá ið skotið verður av fyri enn einari feitari konsert í hølunum hjá Margarinfabrikkini.

Onki tvætl um at"be there or be square""Youll better be there" um so er at alt nú á døgum skal sigast á enskum.




*Lama Sea og onkikanndiskuterast.altkann hava konsert á Margarinfabrikkini fríggjakvøldið*

### Dagurin

**23. september. Linus**, deyður í árinum 79. Var fyrsti eftirmaður Pæturs á pávastóli í Róm. Halgisøgur siga, at hetta er tann Linus, sum nevndur er í 2. Tim. 4, 21, men tað vita teir ikki við vissu.

Dagurin er eisini *heystjavndøgur*.

OLJUTING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað var eitt stórt framstig, tá Føroyar fingu avtalu fyrst við norðmenn, síðani við bretar og loksins við íslendingar um landgrunnsmarkið millum londini. Týdningurin av einum størri landgrunni og harvið ognarrætt/nýtslurætt til størri undirgrund kom serstakliga væl til sjóndar, tá vit eftir drúgvar samráðingar við bretar fingu eitt miðlinjumark, sum í stóran mun fylgir fiskimarkinum. Tað setti gongd á oljuleiting við Føroyar.

Nú er so eftir at finna fram til, hvør eigur landgrunnin, sum liggur uttan fyri 200 fjórðingamarkið og fyri okkara viðkomandi bæði í ein útsynning úr landi (á Hatton-Rockall økinum) og í ein landnyrðing úr landi (í Norðurhøvum).

Hetta er sum so eitt gamalt mál, men lá mestsum í dvala, tá drúgvu og týdningarmiklu samráðingarnar vóru fyrst við danir um rættin til ráevnini í undirgrundini og seinni við bretar um sjálvt landgrunnsmarkið millum Føroyar og Bretland.

Eftir at tað markið kom uppá pláss hava føroyingar saman við dønum skundað undir arbeiðið at kunna gera krøv okkara galdandi til stóru økini fyri sunnan og fyri norðan og í hesum sambandi at finna fram prógv fyri hesum krøvum.

Arbeiðið er nú álvara í gongd og fyri at eingin slingur skuldi vera í valsinum og fyri at fáa hetta so týðandi arbeiði væl frágingið og sett út í kortið frá byrjan, tóku føroyskir myndugleikar stig til at brúka nógva og góða orku til at fremja málið. Tí varð m.a. avgjørt, at Martin Heinesen, sum var leiðari á Jarðfrøðissavninum, skuldi takast burtur frá tí arbeiðinum í eina tíð og ístaðin átaka sær hesa nýggju og fyri Føroya land so týdningarmiklu uppgávu. Á sama hátt er avgjørt at brúka ein av frægu løgfrøðingunum á Løgmansskrivstovuni til hesa uppgávu.

Nú er so arbeiðið so í gongd og hetta hevur fingið nevndini í "Oljutinginum" at skipa koma Oljuting við hesum eina evninum:

"Havrættarsáttmáli Sameindu Tjóða og krav føroyinga um landgrunsrættindi út um 200 fjórðingsmarkið"

Sigmundur Ísfeld á Løgmansskrivstovuni og Martin Heinesen á Jarðfrøðissavninum fara at greiða frá arbeiði teirra, ið kann vísa seg at fáa stóran týdning eisini fyri framtíðar oljuleitingarmøguleikarnar kring Føroyar. Heysttingið verður mikukvøldið 29. september 2004 kl. 19.00 á Hotel Føroyum.




*At føroyingar hava gjørt vart við krøv okkara til landgrunnin uttanfyri 200 fjóðingar sunnan fyri Føroyar er einki nýtt sum so. Eitt nú hava vit gjørt altjóða oljuheimin varugan við hetta á oljumessum í útlandinum sum á hesi ONS messuni í stavanger fyri mongum árum síðani, tá Anfinnur Kallsberg og Eyðun Elttør ráddu fyri borgum í Tinganesi. Her eru teir saman við Kjartan Kristiansen, leiðara á Menningarstovuni*

*Mynd Jan Müller*

### ST

Havrættarsáttmálin hjá ST kom formliga í gildi í 1994. Grein 76 í Havrættarsáttmálanum gevur strandalondum rætt til landgrunn út til 200 fjórðingsmarkið úr landi ella longri, grundað á eina røð av treytum. Strandalond fáa 10 ár, frá tí tey hava staðfest Havrættarsáttmálan, til at gera møgulig krøv galdandi at leggja fyri sonevndu Landgrunsnevndina hjá ST. Danmark ætlar, saman við Føroyum og Grønlandi, at staðfesta Havrættarsáttmálan í ár. Fyri Føroyar hevur løgmaður tílíkar spurningar um hendi, og Sigmundur Ísfeld, ráðgevi á Løgmansskrivstovuni, hevur staðið fyri føroysku fyrireikingunum av staðfestingini av Havrættarsáttmálanum.

Til at fyrireika møgulig víðkaði landgrunskrøv er ein felags ríkisverkætlan sett í verk, har vísindaligar kanningar verða gjørdar og kravpróvførsla verður fyrireikað. Jarðfrøðisavnið samskipar arbeiðið Føroya vegna, og Martin Heinesen, jarðfrøðingur, stendur fyri føroyska partinum av verkætlanini. Á Oljutinginum mikukvøldið 29. september fara hann og Sigmundur Ísfeld at greiða frá teirra arbeiði, sum kann vísa seg at fáa stóran týdning eisini fyri framtíðar oljuleitingarmøguleikarnar kring Føroyar.

Samtakið ENSK spf (El-Service, Normek, Sandblásing & KJ-Hyrdraulik) stuðlar Heysttinginum, og koma umboð at greiða frá teirra framtíðar ætlanum innan oljuvinnuna v.m.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

# Jórun Egholm 40 ára starvsdag

**Fríggjadagin var hátíðarhald í Hvalvíkar skúla í samband við, at Jórun Egholm hevði starvast sum lærari har í 40 ár**

STARVSDAGUR
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Nógv fólk, bæði stór og smá, vóru komin saman í Hvalvíkar skúla fríggjadagin at heiðra Jórun Egholm, nú 40 ár eru liðin, síðani hon byrjaði sum lærari har.

Jórun er fødd og uppvaksin á Eiði, men giftist til Streymnesar. Tí var tað heilt náttúrligt at søkja starv við skúlan, sum hóast hann er í Hvalvík, kortini er so nær heimi hennara í Streymnesi.

Jórun sigur, at hon bleiv serstakliga væl móttikin í skúlanum, og at hon hevur trivist væl í arbeiðnum har.

Skúlagongdin byrjaði beinanvegin fyrsta skúladag við fullari tímatalvu, og tað var nokk so hart, minnist hon. Fyrstu árini undirvísti hon í øllum lærugreinum. Tá varð undirvíst 36 tímar um vikuna, og vikuskiftisfrí fingu tey ikki fyrrenn um 15-tíðina leygardag.

Barnsburðafarloyvi var heldur ikki sum í dag, og við tveimum teimum fyrstu børnunum fekk hon bara 6 vikur farloyvi. Hon fekk tað tó at bera til við hjálp frá manninum, sum heintaði hana við bili í døgurðasteðginum. Men tað mátti ganga skjótt fyri seg, og Jórun mátti geva bróst, samstundis sum hon royndi at fáa ein bita niðurum sjálv. Tá hon fekk sonin, sum er yngstur, var barnsburðafarloyvi longt til 12 vikur, og tað var tað reina luksus, sigur hon.



*Tað er stórur munur á børnunum fyrr og nú. Børnini í dag eru opin og tora betur at koma fram við sínum meiningum - og tað er gott, sigur Jórun Egholm, sum í 40 ár hevur starvast sum lærari í Hvalvík*

Tað er stórur munur á børnunum tá og í dag. Børnini í dag eru opin og tora betur at koma fram við sínum meiningum. Tað heldur Jórun er gott og positivt, hóast tað fyri teimum eldru við hvørt sær út til at kosta, tá tað kemur til kurteisi.

Ofta minnast vit tað farna fyri tað góða og hava hug at síggja tað negativa í nýggju tíðini. Men tað ræður bara um at síggja tað góða og møguleikarnar, vit hava í dag. Eitt, ið avgjørt er betur hjá børnunum í dag, er, at tað er nógv lættari hjá teimum at læra mál. Tey hoyra so mikið nógv til fremmandamál í loftmiðlunum, at tað í dag er eitt spæl at læra bæði danskt og enskt.

Jórun hevur stóran áhuga fyri skúlabókasavninum, og tað hevur hon ikki frá fremmandum. Pápabeiggi hennara var bókavørður á Eiði, og lesihugin hevur Jórun havt góðan frá barni av. Til stuttleika kunnu vit nevna, at áhugin fyri bókum steðgar ikki við Jórun, tí dóttir hennara er bókavørður við bókasavnið í Klaksvík.

### Fakta um Jórun Eghom

Jórun er fødd tann 9. septembur á Eiði, dóttir Elisabeth f. Ejdesgaard og Abraham Abrahamsen, bæði av Eiði.

Hon er gift Janusi Egholm úr Streymnesi.

Hon tók læraraprógv á Haderslev Seminarium í 1964 og hevur verið lærari í Hvalvík síðani tá.

Hon hevur verið á fleiri stuttum skeiðum, serliga í handarbeiði og serundirvísing. Hon hevur verið limur í skúlanevndini frá januar 1980 til desembur 1992 og formaður í barnaverndini árini 1980 til 1984. Jórun hevur verið bókavørður á Hvalvíkar bókasavni síðani 1991.

Hon hevur virkað undir trimum skúlaleiðarum: Fyrst eitt stutt skifti, Eilif Samuelsen, síðani Sjúrður Ferjá og við skúlaársbyrjan í fjør byrjaði, Aslaug Olsen sum skúlaleiðari í Hvalvík.

### Minnirík løta

Lærarar og næmingar høvdu gjørt nógv burturúr fyri at gleða Jórun á hátíðardegnum. Sangir vóru yrktir, og børnini sungu og spældu bæði á gittara og trummur. Og við vakra sangi sínum, fekk Herdis bæði smíl og tár fram hjá áhoyrarunum.

Vegna kommununa og skúlaráðið handaði Heðin Zachariasen, borgarstjóri, Jóruni eina gávu og takkaði henni fyri góða og trúgva tænastu.

Heðin, sum sjálvur hevur verið næmingur hjá Jóruni, segði, at hon umframt at hava lært tey tað fakliga, eisini hevði tikið tað menniskjaliga við og hevði lært næmingar sínar, hvat er rætt, og hvat er rangt.

Jórun helt eisini røðu og segði, at hon var sera glað fyri tíðina, hon hevði verið lærari við Hvalvíkar skúla. Hon helt, at tað kanska var lítið uppfinningarsamt at hava verið so leingi í sama starvi.

Men Jóruni hevur dámt so væl, og hon hevur trívist so væl í Hvalvíkar skúla, at hon framvegis er ein av lærarunum við henda lítla bygdaskúla, sum í dag hevur um hálvthundrað næmingar frá fyrsta til sjeynda flokk.



*Við vakra og hjartanemandi sangi sínum fekk Herdis bæði smíl og tár fram hjá áhoyrarunum. Dreingirnir eru frá vinstru: Brian, Bárður og Daniel*



*Lærarar og næmingar høvdu gjørt nógv burturúr fyri at gleða Jórun á hátíðardegnum. Sangir vóru yrktir, og børnini sungu og spældu bæði á gittara og trummur. Elin Maria, Beinta og Regin Patursson*



*Fólk vóru komin nær og fjar at heiðra Jórun á hátíðardegnum í skúlanum í Hvalvík seinasta fríggjadag. Heðin Zachariasen, borgarstjóri, saman við systkinabarni sínum, Bergtóru til vinstru og manninum, Kára Láadal, sum búgva í Fuglafirði. Dóttir teirra, Heidi, til høgru á myndini, býr í Danmark*